## DAGSINS MEINING

# Bláoygt og ódemokratiskt

Nú er seinasta ætlanin hjá landsstýrinum um at sodnast hjá fólki. Og fólkið ristir við høvdinum!

Hóast danska stjórnin ikki kemur við síni niðurstøðu fyrr enn í dag, tykist greitt, at hon heldur fast um, at heildarveitingin verður strikað eftir fýra árum, um føroyingar vilja skipa landið sum fullveldisríki.

Hetta er eisini viðmerkingin hjá »Peri og Póli«. Danir hava sagt fýra ár, og sjálvt um tilgongdin verður vend á høvdið, fer danska stjórnin, sum hevur fulla undirtøku í fólkatinginum í hesum máli, ikki at býta á nýggja agnið!

Roknaði landsstýrið við tí, so hevur landsstýrið avdúkað eitt slíkt bláoygni - ein slíkan naivitet - at tað er ikki búgvið at sita við landsins valdi! Og verri er, at vit hava ikki eina umsiting, sum er so mikið at sær komin – so búgvin - at hon segði við landsstýrið: - Den går ikke, hatta hoppar stjórnin ikki uppá!

Alt gott um hesi ungu og vælskúlaðu embætisfólk. Teimum vanta royndir, m. a. royndir at lesa politiska spælið og politisku møguleikarnar!

Landsstýrið hevur nú rent seg so dyggiliga fast! Og hvat ger landsstýrið, um stjórnin i dag boðar frá, at skiftistíðin verður fýra ár? Tað ber neyvan til at bakka.

Meiri mening hevði hóast alt verið at hildið fast um upprunaligu ætlanina - tað íslendska modellið - tí tað var jú tað, sum Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin søgdu, at teir tóku undir!

Harafturat er tað eisini í so bláoygt - og diktatorsikt - at siga, at talan er um eina bindandi tilgongd, tá vit bara hava møguleikan fyri vegleiðandi fólkaatkvøðum. Tað er ódemokratiskt at binda fleiri løgting fram, sum bæði løgfrøðingar og andstøðuflokkarnir hava víst.

Sjálvandi skulu vit yvirtaka og minka blokkin, sum Javnaðarflokkurin sigur í tíðindaskrivi, men tá vit hava fyrisitingarliga og fíggjarliga orku til tað! Tað er góður sjálvstýrispolitikkur, sum ber á mál!

**Sosialurin**

# Creamy við stórum »showi«

**Leygardagin verður konsert við Creamy í Runavík, og talan verður um eina framførslu av teimum heilt stóru. Sunnudagin hevði Creamy ta fyrstu royndarsýningina av tí nýggju framførsluni, og eftir øllum at døma ein stórsligin framførsla**

Konsert
*Stefan í Skorini*

"Det bliver en totaloplevelse, som I aldrig har set før", sigur Andreas Mathews, sum er umboðsmaður hjá Creamy, um konsertina.

Við sær úr Danmark hevur Creamy eitt stórt ferðalag, sum skal syrgja fyri øllum tí praktiska á konsertini. Hesuferð taka tær alla útgerðina, sum tær skulu nýta, við sær úr Danmark. Seinast Creamy hevði konsert í Føroyum, høvdu tær hinvegin næstan onga útgerð við sær. Talan verður um flottastu framførsluna, sum er at síggja í Danmark í løtuni.

Andeas sigur, at áskoðararnir verða tiknir við á eina ævintýrferð á konsertini, og tí hava tey valt at taka alla útgerðina, sum skal nýtast at skapa pallmyndina, við upp úr Danmark.

### Presenterað í gávu

Creamy verður presenterað við, at ein stórur gávupakki kemur fram á pallin, og úr pakkanum trína Rannva og Rebekka. Av tí at konsertin ber brá av einum ævintýri, so verður lagt fyri við sanginum "Never Ending Story" av seinastu fløguni hjá Creamy.

Tað hendir allatíðina okkurt á pallinum undir konsertini. Á pallinum verða rumdarskip, jákupskeljar og eitt hús, sum øll sjálvandi eru risastór.

Ljósið á pallinum verður eisini bergtakandi, frætta við úr Danmark. 20 skannarar og eini 70 ymiskar lampur umframt nógv lasaraljós fara at seta dám á konsertina. Eisini verður fýrverkarí.

Sangirnar á konsertini verða fyrst og fremst av tí nýggjastu fløguni, meðan tær eisini fara at tríva í nakrar av gomlu sangunum. Tær fara eisini at syngja okkurt lag á føroyskum, sum tær hava givið út í Føroyum.

Á pallinum verða ein trummusláari, ein spælir á keyboard, seks dansarar umframt tær báðar Rannvu og Rebekku, sum syngja.

Føroyingurin Bjarni Rubek Nielsen var á konsertini hjá Creamy í Greve sunnudagin, og hann segði, at talan er um eitt avbera flott show, og at genturnar vórðu klappaðar uppaftur eftir tann seinasta sangin.

Umboðsmaðurin hjá Creamy sigur, at møguleiki verður eisini at ogna sær ymiskar Creamy-vørur so sum troyggju, keppar o.a.

Tað gongur væl at selja atgongumerkini, og nú er skjótt útselt. Um fullsett verður til konsertina, so er møguleiki fyri at ein eykakonsert verður í Havn dagin eftir.

Creamy hevur selt 350.000 fløgur tilsamans í hálvtannað ár.



*Creamy hevur lagt eina nýggja framførslu til rættis, og fólk fingu eina smakkroynd sunnudagin í Greve. Talan er um eina stóra og vakra framførslu*



# »I'am« vann á Strondum

Føroyskar húgvur og technotónleikur á Strondum

Í kavaroki og vindi varð leygarkvøldið annað umfar av tónleikakappingini Prix Føroyar hildið á Strondum, og vinnarnir av umfarinum varð bólkurin úr Klaksvík, I am, og á annað plássi varð bólkurin Flux, sum eisini skal møta upp tann 21 apríl í norðurlandahúsinum.

Vegna plásst prenta vit reportasjuna í blaðnum í

### Broytingar á Prentmiðstøðini

Sum tað sæst er blaðið eitt sindur broytt í dag - eitt nú er oddagreini og Nøvn í vikuni prentað á síðu fýra í staðin fyri síðu tvey. Orsøkin er, at tekniskar umleggingar verða gjørdar á Prentmiðstøðini, og tí eru møguleikarnir við litprenti skerdir hesa vikuna. Heldur ikki ber til at prenta fleiri enn 32 síður hetta til leygardagin. Vit biða lesarar halda okkum tilgóðar.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk til øll, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, sonur, beiggi og abbi okkara

**Martin Jákup Strøm**

andaðist og varð jarðaður.

Ein serlig tøkk til missiónshúsið í Vági og øllum har, sum hjálptu okkum so nógv í sambandi við jarðarferðina. Eisini stór tøkk til Frelsunarherin fyri vakran sang í landssjúkrahúskapellinum og í kirkjuni í Vági.
Tøkk til Hera Joensen, Erland Beder og Eingrím Holm fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur og takk til øll, sum fylgdu Martini til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Kristbjørg**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Innbúgv og forrit

**Hósdagin lat nýggjur handil upp í Dr. Jakobsensgøtu nevndur Munin, sum fer at selja skrivstovuinnbúgv. Umframt søluvirksemið arbeiða tveir menn í hesi fyritøku við at gera digital landkort av Føroyum**

NÝGGJUR HANDIL
*Stefan í Skorini*

Á fyrstu hædd í Dr. Jakobsensgøtu 18 heldur fyritøkan Munin til. Fyritøkan er býtt í tvær eindir. Tann eina eindin fæst við at menna eitt telduforrit, sum hevur til endamáls at skráseta allar Føroyar í digitalum kortum.

Hin eindin fer at selja skrivstovuinnbúgv, og tað var í hesum sambandi, at Munin hevði móttøku í hølunum hósdagin. Handilin er einaumboð uppá EFG í Føroyum og fer at selja hetta merkið.

Eigarar av fyritøkuni eru Rói Henriksen og Bogi Jacobsen, og afturat sær hava teir tvey starvsfólk. Fyritøkan varð stovnað á heysti í 1998, og frá byrjan av hava teir báðir eigararnir mest fingist við at gera digital landkort.

Fyri nøkrum mánaðum síðani fóru teir í fyritøkuni eisini undir at selja skrivstovuinnbúgv, og nú eru høli eisini fingin til vega til hetta endamálið. Fyritøkan hevur sostatt alt virksemið savnað undir einari lon.

Tann geografiska skrásetingin er kanska tann meira spennandi parturin av fyritøkuni. Teir báðir Rói og Bogi hava longu kortlagt 60-65% av Føroyum, og ætlanin er at hava fingið lagt allar upplýsingar um Føroyar inn á eitt landkort.

Hesi kortini hava óavmarkaðar møguleikar. Tú kanst finna hvat tað skal vera við at leita á hesum kortunum. Bogi var so beinasamur at vísa okkum, hvussu hesi kortini kunnu rigga.

Um tú skalt leita eftir einum staðarnavni í Føroyum, nevnt Høvdin. Skjótt og lætt fann forritið fimm staðarnøvn í Føroyum við tí navninum. Eisini ber til at leita eftir øllum vatnveitingum ella øðrum líknandi í Føroyum, og tað kann vera hent hjá kommunum og øðrum at hava á einum forritið.

Forritið eitur Hugin og fyritøkan eitur Munin. Hetta eru ravnarnir hjá gudinum Óðini, sum flúgva runt og geva gudinum upplýsingar um, hvat fer fram rundan um hann. Soleiðis er eisini ætlanin, at fyritøkan og forritið skulu veita fólki upplýsingar uttan at tey skulu reisa seg frá telduni – ongantíð betri um tey sita í einum stóli úr handlinum.



*Fýra fólk fara at hava sína dagligu gongd í fyritøkuni Munin. Sitandi við skriviborðini eru tað eigararnir Rói Henriksen (vinstrumegin) og Bogi Jacobsen. Katrin Niclasen, standandi høgrumegin, fer at arbeiða í handlinum við at selja skrivstovuinnbúgv, og Jens Jóhan Dam er eisini í starvi hjá Munin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Brotsmannalið á herferð

**Tríggir menn, sum allir eru seinast í tjúgunum, hava um vikuskiftið gjørt um seg í høvuðsstaðnum. Fyrst tóku teir ein bil fyri at sleppa til Prix Føroyar á Strondum, og síðani brutu teir seg inn í tveir handlar**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Havn hevur havt úr at gera um vikuskiftið við at fáa hendur á trimum monnum, sum hava verið á eini innbrotsherferð í Havn leygardagin og sunnudagin.

Tveir av teimum sita í klivanum á løgreglustøðini, meðan tann triðji enn ikki er funnin. Løgreglan sigur seg vita, hvør maðurin er, og væntar at taka hann nakað skjótt.

Fyrst tóku menninir ein Ford Escort vøruvogn, sum stóð parkeraður í Dr. Jakobsensgøtu. Bilin skuldu menninir nýta til at sleppa til Prix Føroyar konsertina, sum var á Strondum leygarkvøldið.

Tá menninir komu aftur til Havnar av Strondum settu teir bilin frá sær á parkeringsøkinum við SMS. Bilurin var illa farin. Forrúturin var knústur, og bilurin hevði eisini fingið aðrar skaðar. Menninir høvdu koyrt útav á landsvegnum og høvdu eisini rent á onkran bil á Strondum. Løgreglan hevur varhugan av, at teir vóru rúsaðir, men eingi prógv eru fyri hesum, tí ongar blóðroyndir eru tiknar.

Meðan tey flestu tóku sær av løttum sunnudagin, lógu teir tríggir menninir ikki á latu síðuni, men fóru aftur til verka.

Tveir handlar stóðu hesuferð fyri skotum. Fyrst varð brotið inn í klædnahandilin Vogue, og síðani fóru teir til Einar Mikkelsen í Tróndargøtu, har teir eisini brutu inn.

Teir fingu ikki nakað stórvegis burturúr hesum báðum innbrotunum.

Sunnukvøldið klokkan 21 fekk løgreglan fatur á tveimum av monnunum, og teir sita nú handan rimar. Tann triðji var enn ikki tikin á middegi mánadagin, men løgreglan sigur seg hava ein varhuga av, hvør tann hesin er, og tí vænta teir at taka hann, áðrenn long tíð er fráliðin.



Føroya bíligastu flogferðir:
Føroyar - Danmark og aftur

~~2600,-~~

1500,-

Vanligur APEX ferðaseðil til Danmarkar kostar kr. 2.600,-
Tilboðið er galdandi frá 1. februar til 1. apríl. Ferðirnar kunnu í mesta lagi vara ein mánað og í minsta lagi yvir leygardag og sunnudag, og skulu tvey ferðast saman.
Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan og kunnu ikki broytast ella endurrindast.
Ferðaavgjaldið sum er kr. 365,- kemur afturat prísinum.

SANSIR TEL 355 355

Atlantic Airways
Tel 333 900 · www.atlantic.fo

Fæst á øllum ferðaskrivstovum kring landið